# Nýggjur útnorðurskrivari

STARVSSETAN
*Tíðindaskriv*

Á fundi í Keypmannahavn 27. januar gjørdi formansskapur Útnorðurráðsins av at seta Þórð Þórarinsson í starv sum skrivari ráðsins frá 15. februar 2005 at rokna.

Þórður Þórarinsson er 37 ára gamal og hevur síðstu tvey árini starvast í kunningardeildini hjá Norðurlandaráðnum og Norðurlanda ráðharraráðnum. Hann hevur staðið BA í samfelagsfrøði á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn og er í løtuni í ferð við at skriva høvuðsritgerð á sama lærustovni.

Þórður tekur við starvinum eftir Ernst S. Olsen, sum hevur verið skrivari Útnorðurráðsins síðstu fýra árini.

Útnorðurráðið er ein samstarvsfelagsskapur millum íslendska Altingið, grønlendska Landstingið og føroyska Løgtingið. Hvørt landið verður umboðað av 6 parlamentarikarum. Ráðið hevur skrivstovu í Reykjavík.

# Herðaklapp skal latast

Ein og í 2003 gjørdi starvsnevndin hjá Javna av, at ein persónur hevur uppiborið heiðurin sum ársins herðaklapp 2004.

Handanin av hesum varð upprunaliga ásett at verða í desember mánaði í fjør, men av persónligum ávum varð hetta tá útsett.

Nú er nýggjur dagur ásettur fyri handanina, og verður hetta fríggjadagin kl. 14, tá verkstaðurin Vón er karmur fyri lítlari samkomu.

-jm

# Danmark snaraði til høgru

**Miðjan er vekk — tað vóru vanliga miðflokkarnir, CD, Kristendemokratarnir og Radikali Vinstraflokkurin, sum tryggjaðu parlamentariska grundarlagið fyri eini stjórn, men aðru ferð á rað er tað ytsti høgravongurin við Danska Fólkflokkinum**

CHRISTIANSBORG
*Marjun Dalsgaard*

Fogh vann stríðið um vælferðarsamfelagið — ella vælferðarsamfelagið tapti. Danmark snaraði til høgru, tá stjórnin hjá Fogh styrktist við tveimum mandatum, sum liggja til høgru fyri Fogh sjálvan.

Fyri fyrstu fer í 21 ár, høvdu Teir Konservativu framgongd, og hetta kemur helst av, at Vinstraflokkurn er farin ov langt til vinstru, og flokkurin hevur tískil mist nakrar veljarar til Teir Konservativu. Men Anders Fogh kann vera glaður, tí tað hann kann missa við at verða so miðjusøkjandi sum hann er, vinnur hann nú við at Teir Konservativu hvødu framgongd. Tað vil siga, at hann kann lata Teir Konservativu taka sær av borgarligu veljarunum, meðan hann sjálvur kann tekkjast miðjuni.

Haraftrat gjørdist Radikala Marianne Jelved stóra sigurskvinnan, men fær einki vald sum so, av tí at hon ikki fekk nógv nógvar mandatar til at hava ein meiriluta saman við Vinstra og Konservatiu — henni væntaði ein tinglim. Radikali Vinstraflokkurin verður roknaður fyri at vera ein borgarligur flokkur, hóast at hann hevur verið stuðulsflokkur hjá Sosialdemokratunum í fleiri ár. Radikali Vinstraflokkurin er helst eisini farin avstað við nógvum av atkvøðunum hjá Javnaðarflokkinum, tí hesin hevur góðtikið harða útlendingapolitikkin hjá VK stjórnini.



*Pia Kjærsgaard frá Danska Fólkflokkinum koyrdi harðari á útlendingapolitikkin enn nakrantíð áður og vann tveir mandatar*

## Pia harðari

Pia Kjærsgaard frá Danska Fólkflokkinum koyrdi harðari á útlendingapolitikkin enn nakrantíð áður og vann tveir mandatar. Eitt uppskot hjá Danska Fólkaflokkinum var til dømis, at alt sum myndugleikarnir skriva av leiðbeiningum og annað skrivligt tilfar skal vera á donskum. Hetta hevur skakað til dømis heilsumyndugleikarnar, sum ræðast hvat hetta kann føra til av ólukkum. Pia Kjærsgaard hevur somuleiðis nevnt, at markið til Svøríkis eigur at verða latið aftur, so innflytarir í Svøríki ikki skulu koma til Danmarkar, um so var, at teir skuldu fingið tað hugskot, at her var betur at vera. Peter Skaarup, ein av tinglimunum fjá Danska Fólkaflokkinum, hevur haraftrat undir valstríðnum, sum grundgeving fyri at allir útlendingar, ið vera familjusamanførdir, skulu lata eina DNA roynd, sagt, at nógvir útlendingar, sum koma til Danmarkar jú verða brotsmenn seinni í lívinum, og tí er tað gott, at myndugleikarnir hava teirra DNA-profil. Orsøkin til, at hetta málið tók seg upp, var, at ein donsk sjónvarpssending avdúkaði, at nøkur børn eru familjusamanførd við foreldrum, sum í veruleikanum ikki vóru foreldur teirra.

## Minni vælferð

Í sjálvum valstríðnum hevur verið ilt at síggja mun á Vinstraflokkinum og Javnðaðarflokkinum, men hetta merkir ikki, at flokkarnir eru eins ella hava somu dagsskrá. Hans Jørgen Nielsen, lekor á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn, er ikki í iva um, at Anders Fogh Rasmussen hevur eina aðra ætlan við vælferðarsamfelagnum enn Mogens Lykketoft.

– Í so máta arbeiðir Javnaðarflokkurin meira fyri javnaði og líkarætti, sigur hann, og leggur aftrat.

– Eg eri slett ikki í iva um, at Anders Fogh er meira liberalur, enn hann sigur, men eg haldi, at hann er pragmatikari, og arbeiðir eftir, hvat hann veit kann lata seg gera politiskt. Tó fer hann altíð at velja tað meira liberalu loysnina, tá hann skal taka avgerðir, sigur Hans Jørgen Nielsen. Hann heldur somuleiðis, at um Fogh verður sitandi í 6-7 ár aftrat, verður danska samfelagið ikki tað vælferðarsamfelag, sum vit kenna tað í dag.

# Danski Javnaðarflokkurin má finna felags leið

**Innanhýsis stríðið í danska Javnaðarflokkinum brýtur møguliga út í ljósan loga, nú nýggjur formaður skal finnast. Skal flokkurin koma fyri seg til næsta val, er neyðugt, at hann finnur eina felags leið, sigur valgranskari**

CHRISTIANSBORG
*Marjun Dalsgaard*

Prísurin fyri innanhýsis stríðið í danska Javnaðarflokkinum hevur verið høgur, og nú nýggjur formaður skal finnast, mugu teir tríggir partarnir, sum stríðast um valdið í flokkinum finna saman um eina leið, sigur valgranskarin, Hans Jørgen Nielsen, ið er lektor á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn. Hann heldur ikki, at nýggi formaðurin í flokkinum nýtist at umboða vinnandi partin í hugsjónarliga stríðnum í Javnaðarflokkinum, heldur eigur ein bólkur at verða settur, ið skal avgerða politisku leiðina í flokkinum.

Danski Javnaðarflokkurin er sum kunnugt tyngdur av einum stríði, ið býtir flokkin í trý. Auken, Lykketoft og Nyrup standa fyri hvør sínari vongi, har Auken liggur longst til vinstru, Nyrup longst til høgru og Mogens Lykketoft liggur eitt stað inn í millum.

Eitt av høvuðsevnunum er ósemja um útbjóðing av almennum størvum, men tíðarandin er broyttur og hesum eiga tey at royna at síggja burtur frá og heldur leggja dentin á at arbeiða fyri javnaði, heldur Hans Jørgen Nielsen.

– Tíðarandin er broyttur, og fría valið er komið fyri at vera. Javnaðarflokkurin skal arbeiða fyri javnaði í samfelagnum, tí tað eru tey samd um, og tað gera tey betur enn Vinstraflokkurin, sigur hann. Eitt annað evni sum skapar trupuleikar í flokkinum er útlendinga- og flóttafólkapolitikkurin.

## Nýtt ættarlið

Hyggur ein eftir aldrinum og politiskum royndum, er eitt nærliggjandi evni til formanssessin politiski orðførarin Frank Jensen, sum longu hevur boðað frá, at hann stillar upp. Trupulleikin er, at Frank Jensen verður sæddur sum krúnprinsurin hjá Auken, og hann hevur enn ikki megnað at gera seg nóg leysan av honum til at leiða flokkin inn á eina felags leið.

Mogens Lykketoft gav heldur einki tekin um, at Frank Jensen fór at yvirtaka formansskapin.

Hann legði dent á, at flokkurin nú má savnast, og at ein nýggjur formaður eigur at finnast við einari demokratiskari gongd. Leiðslan í Danska Javnaðarflokkinum hevur vanliga verið sera stýrandi, tá komandi toppkandidatar verða valdir, men verður ein nýggj leið løgd, kann tað vera, at ein av teimum yngru sleppur framat, og at eitt ættarlið verður lopið um, nevnliga ættarliðið hjá Frank Jensen.

Fleiri góð boð til formansskapin eru millum tey ungu javnaðarfólkini, men ein trupulleiki kann vera, at tey eru ov ung og óroynd. Eitt nú Mette Frederiksen hevur gjørt vart við seg undir hesum valstríðnum, men hon er ung, óroynd og ikki minst er hon nýggj.

– Í danska Javnaðarflokkinum skal ein helst kenna tey røttu fólkini, um ein skal fáa vald, og tað ger Mette Frederiksen ikki, sigur Hans Jørgen Nielsen. Hann heldur tí ikki, at hon verður nýggjur formaðurin. Tó kann denturin hjá Lykketoft á eina demokratiska gongd vera eitt tekin um, at henda síðvenja verður broytt. Lykketoft fer helst ikki frá, fyrr enn flokkurin hevur funnið ein nýggjan formann í friði og náum. Ein orsøk til at Lykketoft tók seg aftur beinanvegin var, at nýggja leiðslan skal hava stundir til at savna og styrkja flokkin áðrenn næsta val.